MENTAMÁLARÁÐIÐ

Dagfesting: **30. september 2016**
Tygara ref**.:**
Máltal**.: 16/00771-9**

**Skúlastýrisvalið í 2016**

Skúlastýrisval verður 8. november 2016.

Sambært § 50, stk. 1 í Ll. nr. 125 frá 20. juni 1997, sum seinast broytt við Ll. nr. 67 frá 26. mai 2011, um fólkaskúlan, skal eitt skúlastýri verða valt til hvønn sjálvstøðugan skúla í kommununi. Í § 51, stk. 1 og 2 í lógini er heimilað landsstýrismanninum at áseta reglur um valið og at taka avgerðir í øllum ivamálum viðvíkjandi skúlastýrum og virksemi teirra.

Skúlamyndugleikin á staðnum er kommunustýrið og skúlastýrið. Tað er sostatt ein kommunal uppgáva at velja skúlastýri, og hava kommunustýrini formligu ábyrgdina av valinum. Arbeiðið at fremja valið er álagt valnevndini í tí einstaka skúlanum, og her hevur skúlaleiðarin høvuðsleiklutin sum valnevndarformaður.

Tíðarætlan í samband við valið:

- 8. nov. 2016 er valdagur. Val til skúlastýrini verða hildin sama dag sum val til allar føroyskar kommunur
- 18. okt. 2016 skal vallistin verða gjørdur. Vallistin skal verða gjørdur í seinasta lagi 3 vikur undan valdegnum og skal liggja frammi í skrivstovu skúlans ella kommunuskrivstovuni í 14 dagar.
- 25. okt. 2016 er seinasta freist at hava uppstillingarfund. Valnevndin boðar veljarum til uppstillingarfund í seinasta lagi 14 dagar undan valdegnum.
- 1. nov 2016 skulu uppskot um valevni vera valnevndarformanninum í hendi.

Uppgávan hjá kommunustýrinum

1. at seta valnevnd
2. at lýsa valið
3. at kunngera valúrslitini
4. at velja kommunustýrisumboð og varaumboð í skúlastýrið

**Viðvíkjandi nr. 1 at seta valnevnd**

Sambært § 4, stk. 1 í kunngerðini er ásett, at kommunustýrið setur eina valnevnd til hvønn sjálvstøðugan skúla í kommununi. Limirnir í valnevndini eru: eitt umboð fyri kommunustýrið, eitt umboð fyri fráfarandi skúlastýri og skúlaleiðarin, sum er formaður. Kommunustýrið kann sbrt. § 4, stk. 3 sjálvt skipa fyri valinum. Mentamálaráðið skal tá hava boð um hetta sum skjótast.

**Viðvíkjandi nr. 2. at lýsa valið**

Kommunustýrið skal sambært § 6 í kunngerðini lýsa alment:
Nær áhugað skulu venda sær til formannin í valnevndini fyri at koma á vallistan

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☎ +298 30 65 00 • 🖷 +298 30 65 55 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

sambært § 5, stk. 5.

- Nær uppstillingarfundur verður
- Nær seinasta freist er at lata valevnislistar inn
- Nær, og hvar valið verður hildið

Lýsingarskyldan kann lúkast við at senda skrivlig boð til heimini, og ætlanin er, at Mentamálaráðið sendir øllum valnevndarformonnum felags upplýsingartilfar í sambandi við valið. Skúlarnir senda foreldrunum skriv við valtilfarinum og einum fylgiskrivi frá skúlanum. Í hesum fylgiskrivi eiga tey í kunngerðini ásettu minstukrøv um fráboðan at verða lýst. Tað er tí ikki nakað krav, at kommunur lýsa við valinum, men fyri øllum, sum hava áhuga í einum vælvirkandi skúla, hevur tað týdning, at flest møgulig foreldur luttaka í valinum. Hvør einstøk kommuna má meta, um hon heldur, at tað er tørvur á at gera vart við skúlastýrisvalið. Tað kann vera við lýsingum, greinum, samrøðum og tílíkum. Alt, sum ger áhugan størri fyri valinum og skúlastýrunum, er vælkomið.

**Viðvíkjandi nr. 3 at kunngera valúrslitini**

Sambært § 21 í kunngerðini boðar valnevndarformaðurin teimum valdu frá valinum, meðan kommunustýrið almannakunnger valúrslitið. Tað er ikki ásett, á hvønn hátt kommunustýrið ger hetta, og tí kann tað verða gjørt gjøgnum fjølmiðlar, lýsing ella uppslagi eftir avgerð kommunustýrisins.

**Viðvíkjandi nr. 4 at velja kommunustýrisumboð í skúlastýrið**

Sambært § 50, stk. 2 punkt 1 í fólkaskúlalógini skulu kommunustýrini velja 2 kommunustýrisumboð og 2 persónlig varaumboð í skúlastýrini í teimum skúlum, sum í minsta lagi hava 20 næmingar og 2 lærarar. Valskeiðið hjá kommunuvaldu limunum er valskeiðið hjá komunustýrinum, og verða teir valdir eftir hvørt kommunuval. Tá ið færri enn 20 næmingar eru í skúlanum, velur kommunustýrið 1 kommunustýrisumboð og eitt varaumboð í skúlastýrið. Foreldur og starvsfólk eru umboðað í skúlastýrinum, og sum høvuðsreglu eiga kommunustýrisumboðini ikki at vera foreldur at næmingum ella starvsfólk í tí skúla/skúlum, sum tey verða vald at umboða.

**Brævatkvøður**

Veljarar, sum ikki kunnu møta á valdegnum, kunnu við at venda sær til formannin í valnevndini atkvøða við brævatkvøðu í seinasta lagi kl. 18.00, dagin fyri valdagin. Tá ið atkvøtt verður við brævatkvøðu, fær veljarin ein atkvøðuseðil og ein brævbjálva at leggja atkvøðuseðilin í. Atkvøðugreiðslan kann í fyrsta lagi fara fram, eftir at valevnini eru góðkend.

Um teir vanligu atkvøðuseðlarnir ikki eru gjørdir, fær veljarin ein valseðil at skriva navnið á valevninum á. Formaðurin í valnevndini saman við einum starvsfólki í skúlanum skrásetir og dagfestir valið á vallistan.

Atkvøðuseðilin verður varðveittur í brævbjálvanum, til valið er liðugt, og atkvøðuseðilin verður síðani taldur við, tá ið uppteljingin fer fram.

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • 🖷 +298 30 65 55 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

**Samsýning til valnevndarformenn**
Samsýning verður latin valnevndarformonnunum sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Kommunufelagið.

**Samstarv og samskifti**
Mentamálaráðið ger reglur og ásetingar í sambandi við skúlastýrisarbeiðið og skúlastýrisvalið, sum verða send saman við hesum skrivi. Eisini verður kunnandi tilfar, faldarar og plakatir, sent kommum og skúlum í næstu viku.
Mentamálaráðið vónar at fáa eitt gott samstarv í sambandi við skúlastýrisvalið, og eru kommunurnar og skúlarnir vælkomin at seta seg í samband við Mentamálaráðið á tlf. 306500 ella í teldubrævi til jenny@mmr.fo.

Hjálagt hesum skrivi eru:
1. Kunngerð um at velja foreldraumboð í skúlastýri og kommunustýrisumboð í felagsskúlastýri
2. Rundskriv um meginreglur fyri skúlastýri
3. Heimildir hjá skúlastýrinum sambært fólkaskúlalógini

Vinarliga

Mentamálaráðið

Jenny Lydersen
*undirvísingarleiðari*